# Frítíðaravloysarar til Farmastøðir og Oyggjaleiðir

Við hesum verður søkt eftir frítíðaravloysarum til farmastøðirnar kring landið og til at avloysa umborð á skipunum í summar, frá umleið fyrst í mai til seinast í september.

**Uppgávur hjá farmastøðunum**
Høvuðsuppgávan hjá farmastøðunum er at fyriskipa, samskipa, viðlíkahalda og menna farmaflutningin millum meginøkið og útjaðarøkini í Føroyum.

*Førleikakrøv*
- Kunnleika til frankering
- Koyrikort til lastbil/trailara
- Koyriloyvi til trukk/tugmastara

**Uppgávur umborð á skipunum**
Høvuðsuppgávan hjá strandfaraskipunum er at røkja innanoyggja fólka- og farmaflutning eftir fastlagdari ferðaætlan og annars aðrar túrar við ferðafólki kring oyggjarnar. Manningin skal tryggja eina professionella kundatænastu á høgum støði, soleiðis at tað at sigla skal verða ein uppliving í sær sjálvum, og tænastufólki skal tryggja, at myndarliga talað skal tað kennast sum at koma á hotell, har hugsað er um øll – børn, vaksin og gomul.
Umsøkjarar skulu til eina og hvørja tíð kunna verða fluttir millum skipini, sum fyriskipað av leiðsluni.
Arbeiðstíðin er fyriskipað í mun til galdandi ferðaætlan hjá tí skipi, ið ein verður settur umborð á.

**Førleikakrøv**
*Stýrimenn:*
- STCW-áteknað vinnubræv sum stýrimaður/skipari við handilsskipum
- Heilsuprógv
- Prógv í nýtslu av bjargingarútgerð
- GMDSS, GOC
- Sløkkileiðari
- Roykkavari
- Fyrsta hjálp

*Maskinmeistarar:*
- STCW-áteknað vinnubræv sum skipsmaskinmeistari/maskinistur
- Heilsuprógv
- Prógv í nýtslu av bjargingarútgerð
- Sløkkileiðari
- Roykkavari

*Kokkar:*
- Vinnubræv sum kokkur/skipskokkur
- Heilsuprógv
- Prógv í nýtslu í bjargingarútgerð
- Sløkkiskeið
- Fyrsta hjálp

*Tænastufólk:*
- Siglingarbók
- Heilsuprógv
- Prógv í nýtslu av bjargingarútgerð
- Sløkkiskeið
- Grundskeið í fyrstu hjálp

*Dekkarar:*
- Minimum 18 mánaðar siglingstíð
- Heilsuprógv
- Kagaraprógv
- Prógv í nýtslu av bjargingarútgerð
- Roykkavari

**Setanartreytir**
Vit rokna við, at tú hevur góð samstarvsevnir, dugir at arbeiða sjálvstøðugt, ert kundavinalig/ur og røkin.
Støvini verða sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfeløg.

**Umsóknir**
Umsóknir við avriti av prósvkjølum, ummælum, CV og tilvísingum skulu sendast til:

Strandfaraskip Landsins
att. Starvsfólkadeildin
Boks 88
FO-110 Tórshavn

og skulu vera fyritøkuni í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 4. mai kl. 12:00.

Um tú ynskir nærri upplýsingar, kanst tú ringja til Strandfaraskip Landsins, á tlf. 343000.

STRANDFARASKIP LANDSINS

Strandfaraskip Landins (SSL) eru landsfyritøka undir Innlendismálaráðnum, hvørs endamál er at lúka landsins tørv á innanlands fólka- og farmaflutningi. Fyritøkan umsitur 29 farleiðir: 22 Bygdaleiðir og 7 Oyggjaleiðir. Samlaða talið av ferðafólkum við SSL í 2006 var 1,1 millión: 620 túsund við bussunum og 480 túsund við ferjunum. Talið av flutningsanleggum er 40 bussar, 8 ferjur og farmaflutningsútbúnaður. Starvsfólkini eru á leið 170 í tali, svarandi til 120 ársverk. Fyrisitingin á SSL er skipað í fimm deildir: Samferðslu-, Rakstrar-, Fíggjar-, Starvsfólka-, Farma- og cateringdeild.




# SKRIVSTOVUFÓLK
## til koyrikortdeildina

Søkt verður eftir skrivstovufólki til koyrikortdeildina at seta beinanvegin. Talan er um eitt fast starv, ið er skipað sum fulltíðarstarv.

**UPPGÁVAN**
Uppgávan fevnir m.a. um:
- Avgreiðslu av viðskiftafólki og telefonavgreiðslu
- Skráseting og framleiðslu av koyrikortum
- Umsiting av tíðum til ástøðis- og koyriroyndir
- Málsviðgerð
- Postavgreiðslu
- Kassauppgerð

**FØRLEIKAKRØV**
Vit hugsa okkum ein persón við skrivstovuútbúgving, HH ella líknandi útbúgving og royndum við arbeiði á skrivstovu. Dentur verður lagdur á, at ein hevur góð samstarvsevni og er fyrikomandi. Tað er ein treyt, at ein hevur kunnleika til at arbeiða við teldu.

**SETANARTREYTIR**
Starvið er lønt eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið. Starvssetanin hoyrir undir Vinnumálaráðið við tilhoyrandi stovnum, umframt Løgmansskrivstovuna og onnur aðalráð.

Upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Tórunn S. Miðberg, deildarleiðara, á telefon 35 04 18.

Umsóknir við møguligum prógvum og viðmælum skulu vera okkum í hendi áðrenn 30. apríl 2007. Vinarliga merkið brævbjálvan »koyrikortdeildin.«

*Akstovan er stovnur undir Vinnumálaráðnum og hevur sum endamál at fremja akfaratøkniligar kanningar og akfaraeftirlit, stila fyri koyriroyndum, útvega fólki koyrikort, umsita skráseting av koyrikortum og umsita akfaraskráseting, skrásetingargjøld og vegskatt. Umframt høvuðsdeildina í Tórshavn, hevur Akstovan sýnsdeildir um alt landið. Á Akstovuni starvast 20 fólk.*

REPROZ

AKSTOVAN

Akstovan | Hoyvíksvegur 57 | Postsmoga 3206 | FO-110 Tórshavn
Tel +298 35 04 00 | Fax +298 35 04 01 | www.akstovan.fo | akstovan@akstovan.fo




# SKRIVSTOVUFÓLK
## til avgreiðsluna

Søkt verður eftir skrivstovufólki til avgreiðsluna at byrja skjótast gjørligt. Talan er um parttíðarstarv seinnapart á degi hvønn dag.

**UPPGÁVAN**
Uppgávan fevnir m.a. um:
- Avgreiðslu av viðskiftafólki og telefonavgreiðslu
- Skráseting av akførum
- Avgreiðslu av skrásetingargjøldum
- Kassauppgerð
- Aðrar fyrifallandi uppgávur

**FØRLEIKAKRØV**
Vit hugsa okkum ein persón við skrivstovuútbúgving, HH ella líknandi útbúgving og arbeiðsroyndum á skrivstovu. Dentur verður lagdur á, at ein hevur góð samstarvsevni og er fyrikomandi. Tað er ein treyt, at ein hevur kunnleika til at arbeiða við teldu.

**SETANARTREYTIR**
Starvið er lønt eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið. Starvssetanin hoyrir undir Vinnumálaráðið við tilhoyrandi stovnum, umframt Løgmansskrivstovuna og onnur aðalráð.

Upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Hans Jacob Stenberg, deildarleiðara, á telefon 35 04 08. Umsóknir við møguligum prógvum og viðmælum skulu vera okkum í hendi áðrenn 30. apríl 2007. Vinarliga merkið brævbjálvan »avgreiðslan.«

*Akstovan er stovnur undir Vinnumálaráðnum og hevur sum endamál at fremja akfaratøkniligar kanningar og akfaraeftirlit, stila fyri koyriroyndum, útvega fólki koyrikort, umsita skráseting av koyrikortum og umsita akfaraskráseting, skrásetingargjøld og vegskatt. Umframt høvuðsdeildina í Tórshavn, hevur Akstovan sýnsdeildir um alt landið. Á Akstovuni starvast 20 fólk.*

REPROZ

AKSTOVAN

Akstovan | Hoyvíksvegur 57 | Postsmoga 3206 | FO-110 Tórshavn
Tel +298 35 04 00 | Fax +298 35 04 01 | www.akstovan.fo | akstovan@akstovan.fo

